Michael Austin spælir Bach

Í sambandi vi› at ta› í ár eru li›in 250 ár sí›ani, at mæta t‡ska tónaskaldi›, Johann Sebastian Bach, doy›i, kemur kendi urguleikarin, Michael Austin, til Føroya at hava tvær konsertir.

Á hesum kosertum fer Austin at spæla verk eftir Bach.

Fyrra konsertin ver›ur í Christianskirkjuni í Klaksvík hóskvøldi› klokkan 20.00. Seinna konsertin ver›ur fríggjakvøldi› klokkan 20 í Glyvra kirkju.

Michael Austin, sum er føddur í Onglandi, men er danskur statsborgari, hevur havt óteljandi konsertir kring um í heiminum, og allar sta›ir, har hann er komin, hevur havnn veri› fagna›ur fyri sítt gó›a urguspæl.

Fyrireika nú barnagar›in

Klaksvík: Arbei›i› at gera húsini, har n‡ggi barnagar›urin í Klaksvík skal halda til, er nú í gongd.

Seinastu tríggjar vikurnar hava fólk arbeitt í húsunum vi› Kjalarvegin, sum Klaksvíkar kommuna hevur yvirtiki› og skal brúka til barnagar›.

Fyrstu børnini ver›a tikin inn á stovnin 1. desember, og pláss ver›a í fyrstu syftu fyri 48 børnum. Ætlanin er, at barnagar›urin seinni skal hava pláss fyri 64 børnum.

Upprunaliga ætlanin var, at barnagar›urin skuldi lata upp í hesum móna›inum, men arbei›i› er seinka› einar tveir móna›ir av ymsum orsøkum.

ek

Einki kom burtur úr fundinum

Høgni Hoydal helt eftir fundin vi › danska løgmálará›harran, at embætismenn hjá pørtunum júst ta› sama kundu havt hildi› fundin

Samrá›ingar
Ey›un Klakstein

Landsst‡ri› helt seg ikki fáa naka› sum helst burtur úr at samrá›ast vi› danska løgmálará›harran, Frank Jensen, mánadagin. Mynd: Jens Kristian Vang

Føroysku landsst‡risfólkini ásanna›u eftir fundin vi› danska løgmálará›harran seinnapartin mánadagin, at einki veruligt úrslit spurdist burturúr.

- Hesin fundurin kann ikki brúkast til naka›, tá vit hitta donsku stjórnina hósdagin. Ta› kundi eins væl veri› embætisfólk hjá pørtunum sum hittust, tí Frank Jensen hev›i ongar heimildir fingi› til at samrá›ast naka› upp á pláss, seg›i Høgni Hoydal, varaløgma›ur, á tí›indafundinum mánakvøldi›.
Endamáli› vi› fundinum var sambært landsst‡rinum at fáa partar av samrá›ingunum endaliga upp á pláss, me›an danska stjórnin helt, at talan var um fyrireikandi fund, sum skuldi lætta um fundin í morgin.

- Vit hava tiki› nøkur smá fet fyri at skilja stø›una hjá hvørjum ø›rum, og tá ta› nú eina fer› eru politikarar sum føra samrá›ingarnar hósdagin, er ta› gott vi› einum slíkum fundi, helt Frank Jensen, løgmálará›harri.

Politiski viljin manglar

Undan fundinum var ósemja um, hvat ætlanin vi› fundinum var.

Landsst‡ri› vildi hava ítøkilig úrslit burtur úr, me›an danski løgmálará›harrin nokta›i fyri at gera nakra ávegis semju. Danski politikkurin í hesum samrá›ingunum hevur veri›, at eingin semja er gjørd, fyrr enn semja er um øll økini, sum samrá›st ver›ur um.

- Ta› er eingin løgfrø›islig ella umsitingarlig for›ing fyri at gera eina avtalu um ríkisborgararættindini. Nú er ta› ein spurningur um politiskan vilja, men har mugu vit ásanna, at danir eru ikki huga›ir fyri eini avtalu um javnbjó›is rættindini hjá hvørjum ø›rum, seg›i Helena Dam á Neystabø, landsst‡risma›urin, sum eisini var vi› á fundinum mánadagin.

Vanlig mannagongd

– Landsst‡ri› harmast, at vit ikki kundu koma til nakra felags ni›urstø›u í dag, tí ta› er trupult at koma ví›ari vi› samrá›ingunum, tá ongar ni›urstø›ur ver›a gjørdar, seg›i Høgni Hoydal.

Hann helt, at Frank Jensen ongar heimild hev›i fingi› til veruliga at samrá›ast vi› landsst‡ri› og at finna semju, og tí kundi einki ítøkiligt úrslit spyrjar burturúr.

Men hesum var danski løgmálará›harrin ósamdur vi› honum í.

– Her er talan eina púra vanliga mannagongd, tá talan er um samrá›ingar, og tí er einki gali› vi› mínum heimildum at samrá›ast. Solei›is eru samrá›ingar, seg›i Frank Jensen.

Hósdagin hittast landsst‡risfólkini og Frank Jensen aftur, men tá ver›ur ta› í einum størri forum vi› fleiri umbo›um fyri landsst‡ri› og donsku stjórnina.

Nokta føroyingum javnbjó›is rættindi

Danska stjórnin nokta›i enn einafer › fyri at lata føroysku ríkisborgarum somu rættindini sum danskir, um føroyskt fullveldi ver›ur veruleiki

Rættindi
Ey›un Klakstein

Á fundinum millum landsst‡risfólk og danska løgmálará›harran mánadagin vóru ríkisborgararættindini ovast á dagsskránni.

Landsst‡ri› ynskir, at føroyskir ríkisborgarar fáa somu rættindi í Danmark sum danskir ríkisborgarar, um Føroyar taka fullveldi. Og sama ver›ur galdandi fyri danskar ríkisborgarar í Føroyum.

– Fyrisitingarligt og menniskjaligt er ta› nógv best vi› javnbjó›is rættindum, tí so sleppur tú undan at seta fólk í eina óhepna stø›u, har tey skulu velja, hvar tey vilja ver›a ríkisborgarar, heldur Høgni Hoydal, varaløgma›ur.

– Talan er um so lítlan mun millum javnbjó›is rættindini og tær nor›urlendsku avtalurnar á økinum, at ta› hev›i veri› nógv best og lættast, um vit lótu borgarunum hjá hvørjum ø›rum hava somu rættindi, sigur Helena Dam á Neystabø, landsst‡risma›ur.

Vali› og avlei›ingar

Frank Jensen vísir kravinum um javnbjó›is rættindini frá sær, og grundgevingin fyri tí er tann sama, sum á›ur hevur veri› at hoyrt frá donsku stjórnini.

– So leingi føroyingar eru vi› í ríkisfelagsskapinum, hava teir júst tey somu rættindini sum danir og grønlendingar, men um Føroyar velja at fara úr ríkisfelagsskapinum, so hevur ta› vali› eisini nakrar avlei›ingar vi› sær, sigur Frank Jensen.

– Vit eru sinna› at lata fáa grei›i á, hvussu vit gera vi› teimum føroyingum, sum í løtuni eru búsitandi í Danmark, tí sjálvandi skulu teir hava møguleika at búgva í Danmark vi› somu rættindum sum danir, sigur hann.

Landsst‡ri› hevur ikki givi› upp at fáa semju um ríkiborgararættindini, og landsst‡ri› heldur, at talan er um politiskan vilja fyri at gera semju um javnbjó›is rættindini hvør hjá ø›rum.

Betri enn Nyrup

Samrá›ingarandin var gó›ur, men eingi úrslit vóru at peika á, tá landsst‡risfólk hittu danska løgmálará›harran

Samrá›ingar
Ey›un Klakstein

Føroysku landsst‡risfólkini róstu einum stórsmílandi Frank Jensen eftir fundin í Tinganesi í mánadagin.

Samrá›ingarandin hev›i veri› gó›ur, og stundir vóru eisini til at skemta sær, helt Høgni Hoydal fyri, tá hann setti hol á tí›indafundin tí›liga mánakvøldi›.

Meira enn eina fer› undir tí›indafundinum ró›i varaløgma›ur fram undir, at úrsliti› av fullveldissamrá›ingunum helst hev›i veri› ø›rvísi, um ta› var danski løgmálará›harrin og ikki danski forsætisrá›harrin, sum ráddi fyri borgum, tá ta› snú›i seg um Føroyar.

Smá fet ella eingi

Tá Høgni Hoydal var› spurdur, hví hann helt ta›, var hann skjótur at draga í land og helt fyri, at ta› skuldi hann ikki takast til inntøku fyri at siga.

Eisini danski løgmálará›harrin helt, at talan var um samrá›ingar vi› einum gó›um tóna, men bá›ir partar høvdu trupult vi› at peika á ítøkilig úrslit av positiva andanum.

Frank Jensen tosa›i um smá fet, me›an Høgni Hoydal og Helena Dam á Neystabø hildu, at eingin var komin úr sta› undir samrá›ingunum

Eftir at hava kunna› Uttanlandsnevndina, bo›a›i landsst‡ri› í gjár til tí›indafundar, nú fari› ver›ur á fund vi› donsku stjórnina. Serliga eitt bræv frá danska forsætisrá›harranum fyrradagin til løgmann var› nógv umrøtt

Ivi sáddur um rættindi føroyinga

Í morgin ver›ur fundur í Keypmannahavn millum landsst‡ri› og donsku stjórnina. Landsst‡ri › ætlar fyrst og fremst at gera status og kanna, hvussu komast kann ví›ari í samrá›ingunum um ríkisrættarligu stø›u Føroya. Ikki sørt, at stø›an tykist ørkymlandi, tí í brævi bo›ar Nyrup frá, at samrá›ingarnar “ikke kann kann tages som udtryk for, at Danmark anerkender Færøerne som et selvstændigt folkeretssubjekt”.

SAMRÁ›INGAR
Dagfinn Olsen

Fyrrapartin í gjár bey› landsst‡ri› til tí›indafundar, eftir at fundurin vi› Frank Jensen er farin framvi› og í samband vi›, at fundur ver›ur millum landsst‡ri› og donsku stjórnina í morgin í Keypmannahavn.

Eftir fund vi› Uttanlandsnevndina, vóru tí›indafólk bo›in til fundar í Tinganesi. Løgma›ur Anfinn Kallsberg gjørdi greitt, at dagskráin fyri fundin í Keypmannahavn er at gera status og taka upp yvirordna›u prinsippini vi›víkjandi suvereniteti.

Løgma›ur greiddi frá, at roynt ver›ur á fundinum í Keypmannahavn at koma til eina ni›urstø›u. Føroysku samrá›ingarfólkini hava bi›i› um, at ein felagsor›ing ver›ur gjørd eftir fundin, men hetta ver›ur ikki gingi› á møti. Danska stjórnin metir, at enn er ov tí›liga.

Ivi sáddur

Helena Dam á Neystabø, Anfinn Kallsberg og Høgni Hoydal greiddu frá á tí›indafundinum. Fremsta á skránni er at fáa gjørt status og fáa grei›u á, hvussu farast kann fram ví›ari.

Tí›indafólk løgdu til merkis, tá brævaskifti› millum løgmann og danska forsætisrá›harran var› b‡tt út, at Poul Nyrup kemur vi› merkisverdari or›ing.

Hann sigur m.a. í brævi til løgmann fyrradagin 23/10-2000, “at der nu iværksættes egentlige forhandlinger..... ikke kan tages som udtryk for, at Danmark nu anerkender Færøerne som selvstændigt folkeretssubjekt”.

Greitt er, at ivi er sáddur um, hvørt føroyingar eiga nakran rætt ella avger›arrætt vi›víkjandi fullveldi ella suvereniteti.

Landsst‡risfólkini løgdu dent á, at ta› er av stórum t‡dningi, at hesin setningur hjá Nyrup ikki sleppur at hanga í luftini.

- Hann má manast í jør›ina, seg›i Helena Dam á Neystabø.

Frumrættur

Løgma›ur og varaløgma›ur løgdu dent á, at ney›ugt er at gera greitt, at júst hetta er ikki eitt samrá›ingarevni. Landst‡risfólkini gjørdu greitt, at rætturin hjá føroyingum at taka stø›u til Føroya framtí› er ein frumrættur, i› føroyingar eiga.

- Henda rætt mugu vit ikki lata. Ikki nú ella um hundra› ár, seg›i Helena Dam á Neystabø.

Høgni Hoydal helt vera sera álvarsamt, at ivi solei›is er sáddur um rættindi føroyinga vi›víkjandi suvereniteti ella hvørt vit eru sjálvstø›ug tjó›.

- Vit mugu gera greitt, at ta› er ikki samrá›ingarevni, hvørt vit hava rættin. Vit skulu samrá›ast um treytirnar og mannagongdina, seg›i Høgni Hoydal.

Høgni Hoydal helt, at eftir fundin vi› Frank Jensen er greitt, at ongar tekniskar for›ingar eru. Stundin er komin til eina ni›urstø›u, tí eftir fleiri samrá›ingarumfør er einki ítøkiligt komi› á papíri›.

- Eingin meining er longur í at skriva long notat og brøv, seg›i Høgni Hoydal.

Anfinn Kallsberg metti ney›ugt vera at koma burturúr donskum statsrætti og yvir í fólkarætt.

N‡ggj stø›a

Uppá fyrispurning um, hvørt samrá›ingarnar nú aftur eru har, i› byrja› var›, seg›i løgma›ur, at ta› kann møguliga sigast so, men júst tí er ney›ugt at gera status og koma til ni›urstø›ur. Samstundis sæst, hvørt partarnir kunnu semjast um naka›.

Á tí›indafundinum í gjár slapst ikki undan, at reglurnar hjá Nyrup til løgmann fyrradagin spøktu aftur og aftur.

Løgma›ur gjørdi greitt, at landsst‡ri› vil hava forsætisrá›harran at føra fram, at hann er samdur í, at rættur og stø›utakan vi›víkjandi Føroya framtí› liggur í Føroyum.

- Ger hann ikki ta›, so eru vit í eini heilt n‡ggjari stø›u, men eg trúgvi ikki, at tann stø›an kann taka seg upp, seg›i Anfinn Kallsberg, løgma›ur.

Landsst‡risfólkini vóru samd um, at suvereniteur er ein sjálvfylgja. Bert skal samrá›ast og leggjast tilrættis hvussu. Talan er um frumrætt, i› ikki er samrá›ingarevni.

Sostatt er greitt, at landsst‡ri› fer til Keypmannahavnar at gera staus og gera ni›urstø›u. Samstundis skal sláast fast, at rætturin til at taka avger›ir um framtí› Føroya liggur í Føroyum og at hetta ikki er samrá›ingarevni í sjálvum sær.

Nær føroyingar kunnu vænta at sleppa til fólkaatkvø›u um framtí›atstø›u Føroya, vildi løgma›ur ikki siga naka› um á tí›indafundinum, tí ta› helt hann vera ov tí›liga.



indlede forhandlingerne om færøsk suverænitet.

Som du sikkert husker, fastslog jeg på vort møde den 2. maj 2000: "at det forhold, at der nu iværksættes egentlige forhandlinger om en traktat mellem Danmark og Færøerne, ikke kan tages som udtryk for, at Danmark nu anerkender Færøerne som et selvstændigt folkeretssubjekt".

Med venlig hilsen

Á tí›indafundinum í gjár slapst ikki undan, at reglurnar hjá Nyrup til løgmann fyrradagin spøktu aftur og aftur.